## Landsverk kannar brúgvar

Seinastu tíðina hevur Landsverk saman við ráðgevum frá donsku fyritøkuni Rambøll í Danmark, verið kring landið og kannað og gjørt støðumetingar av øllum brúm á landsvegunum í Føroyum. Samanlagt eru 300 brúgvar bara á landsvegunum í Føroyum, so talan er um eitt rættuliga víttfevnandi arbeiði. Brúgvarnar eru úr 1,2 metrum upp í 220 metrar. Eftirlitsarbeiðið, sum fer fram eftir donskum standardi, byrjaði í fjør, tá tann longsta brúgvin upp á 220 metrar, sum er um Streymin, var kannað. Nú er so restin av eftirlitsarbeiðnum skjótt liðugt.

*(kelda: landsverk.fo)*



## Dement í Miðlahúsinum

Mánakvøldið 24. septembur kl. 19.30 skipar Alzheimerfelagið fyri evniskvøldi í Miðlahúsium um samspælið millum avvarðandi hjá demenssjúkum og starvsfólk innan heilsuverkið. Evnið er »Tá ið demens gerst partur av gerandisdegnum«. Fyrilesturin fer millum annað at snúgva seg um, at tá ein av teimum næstu verða rakt av demens, rakar sjúkan øll. Og um týdningurin av samstarvi millum avvarðandi og starvsfólk. Fyrilestrarhaldari er Birgitte Vølund, ið er sjálvstøðugur sjúkrarøktarfrøðingur og hevu master í gerontologi. Fyrilesturin byggir á eina trý ára langa verkætlan um avvarðandi at veikum eldri. Tey seinastu 25 árini hevur hon arbeitt innan eldrarøkt og verið við til at menna demensøkið.

# Hótta við verkfalli á sjúkrahúsunum

**Stríðið um portørarnar á teimum trimum sjúkrahúsunum er nú við at koma í hæddina. Fleiri portørar hótta nú við at leggja arbeiðið niður á staðnum fáa teir ikki sín vilja frá Fíggjarmálaráðnum**

VERKFALSHÓTTAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ósemjan um portørarnir eru nú við at kóka yvir, og fleiri av portørunum hótta við at leggja arbeiðið niður fyri at tvinga Fíggjarmálaráðið í knøini*

Vandi er nú aftur fyri verkfalli á teimum trimum sjúkrahúsunum.

Hesuferð eru tað portørar sum hótta við at leggja arbeiðið niður og at leggja bæði sjúkraflutning og annars alla portørtænastu, lamna.

Tað fara teir at gera upp á standandi fót og uttan áðra ávaring, verða teirra krøv ikki eftirlíkað.

Og tað kann vera nær sum helst, at tað hendir.

### Stríð um portørar

Tað eru nú nakrir mánaðir síðani, at stríð tók seg upp um, hvørjum fakfelag portørarnir skuldu vera í.

Hesi síðstu 40 árini hava portørarnir í øllum landinum verið limir í Havnar Arbeiðsmannafelag. Men fyri nøkrum mánaðum síðani gjørdu nakrir portørar av at melda seg inn í Starvsmannafelagið.

Í løtuni eru umleið tveir triðingar av portørunum limir í Starvsmannafelagnum og ein triðingur er eftir í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Tí hevur Starvsmannafelagið nú kravt at sleppa at samráðast við Fíggjarmálaráðið um sáttmála fyri allar portørarnar.

Sáttmálin millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag um portørarnar, gongur út nú 1. oktobur og sostatt áttu samráðingar av røttum at byrja nú.

Og Starvsmannafelagið hevur nú um dagarnar boðað Fíggjarmálaráðnum púra greitt frá, at verða samráðingar aftur við Havnar Arbeiðsmannafelag um nýggjan sáttmála fyri portørarnar, fara portørarnir, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, at leggja arbeiðið niður upp á standandi fót og uttan aðra ávaring.

### Kann forða fyri betri sáttmála

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur, at hóast sáttmálaskeiðið er úti 1. oktober, er sáttmálin ikki sagdur upp.

Men hann sigur, at alt talar fyri, at hann verður sagdur upp til at fara úr gildi 1. januar.

- Fyrsta dagin er ætlanin at fara undir samráðingar við fíggjarmálaráðið um ein nýggjan sáttmála.

Og Hans Joensen letur ongan iva vera um, at Havnar Arbeiðsmannafelag fer ikki at siga samráðingarrættin frá sær.

- Vit hava havt samráðingarrættin í 40 ár og tann rættin fara vit ikki at sleppa, leggur hann dent á.

- Tað stendur fast, at tað vera vit, sum fara at samráðast um nýggjan sáttmála fyri portørarnar, leggur hann afturat.

Sostatt er hóttanin frá Starvsmannafelagnum um arbeiðssteðg so aktuell, sum hon fær verið.

Og formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag dylir ikki fyri, hvussu misnøgdur hann er við framferðina hjá Starvsmannafelagnum.

- Tað er langt úti hjá einum fakfelagi at leggjast á eitt øki, sum eitt annað fakfelag hevur havt í 40 ár.

Hann heldur eisini, at framferðin hjá Starvsmannafelagnum kann forða fyri, at portørarnir fáa ein nøktandi sáttmála.

Hóast tað eru vit, sum hava samráðingarrættin, kann støðan gera, at vit fara at himprast við at fara undir samráðingar um nýggjan sáttmála, fyri ikki at seta lív og heilsu í vága í einum verkfalli.

Hann sigur, at leggja portørar í Starvsmannafelagnum arbeiðið niður, er tað ikki ein trupulleiki hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, men eitt mál ímillum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, sum eisini má loysast teirra millum.

### Vánaligt samskifti

Men nú er tað ein meiriluti av portørunum, sum heldur vil vera í Starvsmannafelagnum. Hevði tað so ikki verið meiri demokratiskt av Havnar Arbeiðsmannafelag at latið meirilutan rátt og givið Starvsmannafelagnum samráðingarrættin?

- Tað haldi eg ikki. Portørarnir kunnu gjarna vera limir í tí felagi, teir vilja, men vit eiga samráðingarættin og honum sleppa vit ikki.

- Skuldu vit slept einum heilum samráðingarøki, kann tað ikki henda bara tí at nakrir portørar fáa aðrar við sær yvir í eitt annað felag. Skulu broytingar gerast, eigur tað at verða gjørt í góðum samskifti millum partarnar. Í hesum føri hevur verið arbeitt í tí dulda fyri okkum og tað er ódámlig framferð av einum fakfelag ímóti einum øðrum.

Hans Joensen leggur afturat, at honum vitandi, er tað ikki hent, at eitt fakfelag sigur eitt sáttmálaøki frá sær.

Hvat hendir so, skuldi tað hent, at Fíggjarmálaráðið eftirlíkar kravinum frá Starvsmannafelagnum?

- Tað fáa vit neyvan gjørt nakað við, sigur Hans Joensen.

## Taka portørar í størsta álvara

**Gunnleivur Dalsgarð sigur, at tað eru portørarnir sjálvir, sum vilja sleppa í Starvsmannafelagið og tað tekur felagið í fullum álvara**

VERKFALSHÓTTAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ikki Starvsmannafelagið, sum vil ræna portørarnir frá Havnar Arbeiðsmannafelag. Tað eru portørarnir sjálvir, sum hava boðað frá, at teir vilja hava Starvsmannafelagið at gera sáttmála fyri teirra øki.

Tað sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum.

Og hann leggur afturat, at tað er ein áheitan, Starvsmannafelagið sjálvandi tekur í fullum álvara.

Hann sigur at nógv teir flestu portørarnir eru limir í Starvsmannafelagnum og hann heldur, at tað er ódemokratiskt at Havnar Arbeiðsmannafelag at tvíhalda um samráðingarrættin og sostatt lata ein minniluta hava ræðið á einum meiriluta.

- Fyri okkum er hetta ikki eitt stríð við Havnar Arbeiðsmannafelag, men hetta er ein spurningur um at ganga áheitanini frá einum meiriluta til eftirtektar.

Hann heldur eisini, at tað er natúrligt, at portørarnir eru limir í Starvsmannafelagnum, tí felagið umboðar eisini sama slag starvsbólkar í heilsuverkinum.

- Tað er meiri løgið, at eitt fakfelag tvíheldur um nakrar limir, sum ikki vilja vera har, leggur hann afturat.

## Umhugsa støðuna í Fíggjarmálaráðnum

**Í Fíggjarmálaráðnum hava tey ikki tikið støðu til, hvussu tey fara at loysa stríðið um portørarnar**

VERKFALSHÓTTAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í fíggjarmálaráðnum vilja tey ikki siga, hvussu tey ætla at loysa kreppuna, sum hevur tikið seg upp um sáttmálaviðurskiftini hjá portørunum.

Í aðrari grein her á síðuni fortelja vit, at Starvsmannafelagið hevur hótt við verkfalli upp á staðið, sleppur felagið ikki at samráðast um portørarnar.

Snorri Fjalsbak, leiðari á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, váttar, at hesi greiði boðini eru komin frá Starvsmannafelagnum og at tey nú hugsa tey um, hvat er at gera.

Samstundis sigur hann, at ongin avgerð er tikin enn.

*Men tú hevur fyrr boðað frá, at Fíggjarmálaráðið fer ikki at samráðast við tvey fakfeløg um sama sáttmálaøki.*

- Ja, vit tað er ivaleyst at hava ein sáttmála fyri hvørt øki og tann støðan er ikki broytt, svarar Snorri Fjalsbak stutt.

*Men, hvussu verður tað uppfatað, skuldi tað hent, at tit fara at samráðast við Havnar Arbeiðsmannafelag og portørarnir í Starvsmannafelagnum av tí sama leggja arbeiðið niður?*

Tað fer at verða uppfatað sum eitt »óheimilað stríðsstig«, sigur leiðarin á lønardeildini.

*Hvørjar eru avleiðingarnar av tí?*

- Tað havi eg onga viðmerking til í løtuni, leggur hann afturat.